Notat

Til Umhvørvismálaráðið

Um. Hoyringssvar til uppskot til broyting í elveitingarlógini

Frá Vilhjálmi Nielsen

Yvirskipaðar viðmerkingar

24-01-2024
Journal nr. xxx
VINI

Tað hevur leingi verið greitt at orkuskiftið kravdi broytingar í elveitingarlógini. Tí er gleðiligt at síggja, at elveitingarlógin nú stendur til at vera broytt. Grundarlagið fyri hesum er semjan millum kommunufelagið og Landsstýrið, ið var gjørd undir undanfarna landsstýri. Gott at síggja, at tað ikki verður byrjað av nýggjum við hvørjum landsstýri – Har er semja um yvirskipaðu gongdina.

Lógarbroytingin marknaðargerð søluliðið og býtir SEV upp í eina neteind ið eisini rekur motorverkini, vatnorkuna og battarískipanirnar. Restin verður drivið av ymiskum framleiðarum, sum kunnu vera SEV men eisini privatir aktørar, sum framleiða inn á netið eftir treytum, sum fylgdu við góðkenningini. Sølueindin hjá SEV verður so í kapping við privatar aktørar. Serliga hesin parturin, umframt at latið verður upp fyri, at elprísurin verður útroknaður tíma fyri tíma, hevur vakt ótta millum fólk. Tí er vert at viðmerkja, at uppskotið loysir ein av stóru trupulleikunum á Europeiska elmarknaðinum – at prísirnir knappliga eru blivnir ógvuliga høgir, tá lítil vindur er og stórur eftirspurningur. Hetta er loyst snildisliga í uppskotinum við at elprísurin verður roknaður út sum meðal framleiðslukostnaðurin (meðal keypsprísurin og framleiðslukostnaðurin hjá SEV) heldur enn prísurin á dýrastu (marginalu) framleiðsluni, sum annars er vanlig prísseting á einum marknaði.

Eisini er gott at greitt er tilskilað í lógini, at loyvi til framleiðslu kann leingjast og tillagast til nýggja tøkni, um treytirnar fyri góðkenning vera loknar. Týðningurin av at hetta er greitt tilskilað sæst kanska serliga av rættarstøðuni í Danmark í løtuni, har tað ikki er greitt, um vindmyllurnar á Middelgrunden beint uttanfyri Keypmannahavn kunnu fáa nýtt loyvi, tá verandi gongur út. Úrslitið er, at neyðugar íløgur til framhaldandi rakstur ikki vera gjørdar.

Tað er eisini gott at fjarhiti endiliga verður skipaður við lóg, so skipaði viðurskifti fáast á økinum. Tað er so her gjørt við at gera tað til part av elveitingarlógini. Tað er eitt val, men tøkniliga er talan um heilt ymisk øki. Tað eigur í ávísan mun at føra til ymiskar umsitingarreglur.

CVR-nr. DK 30 06 09 46

DTU Construct
Institut for Byggeri og Mekanisk teknologi
Anker Engelunds Vej 101
Bygning 101
2800 Kongens Lyngby
Tel. 45 25 25 25
Dir. 45 25 18 61
vini@dtu.dk
www.dtu.dk

Niðanfyri eru meira ítøkiligar viðmerkingar

Undantak fyri útboðskravi - framleiðsla til egna nýtslu

Í uppskotinum stendur greitt at útboð skal vera um elframleiðslu omanfyri ein ávísan mátt – og at tað er galdandi fyri alla tøkni og varandi orkukeldu. Hetta er helst skilagott, tí t.d. sjódrekar og sólorka krevja eisini pláss, ið er avmarkað. Tí ræður um at fáa sum mest burturúr teimum støðum, ið eru egnaði til elframleiðslu.

Eitt undantak fyri hesum er tó elframleiðsla til egna nýtslu. Tað stendur ikki heilt greitt, hvussu egin nýtsla skal tulkast – um tað skal vera sama felag, sami matrikul ella um aðrir avmarkingar eru. Tað stendur tó greitt, at um loyvi fæst til egna framleiðslu, so er bert loyvt at selja eina lítla nøgd av el til SEV.

Tvær verkætlanir um elframleiðslu til egna nýtslu hava verið alment frammi – Tað er

- Sólorkuskipan á egnum taki á Hiddenfjord á Fútakletti og
- Eysturlund hjá m.a. Effo, ið vil nýta vindorku til framleiðslu av hydrogeni til brennievni og oxygeni til alivinnuna.

Sólorkuskipanin hjá Hiddenfjord er á takinum á sama matrikli, har framleiðslan skal nýtast, so tað elvir ikki til trupulleikar og hetta er nevnt sjálvstøðugt í uppskotinum.

Við Eysturlund er tað øðrvísi, tí talan verður um vindmyllulund til egna framleiðslu, sum verður á øki, sum annars kundi havt vindmyllur, ið framleiða á netið og sostatt kundu minka um tørvin á elframleiðslu frá olju. Samstundis er greitt, at tá vindmyllulundin fyrst stendur, so vilja samfelagsbúskaparligar- og umhvørvismetingar kunna vísa, at tað er gagnligt, um vindmyllulundin framleiðir inn á netið, tí tað vil minka um samlaða útlátið, um ikki nóg stórur vindmyllumáttur annars er tøkur. Tað er tí sannlíkt at ávíst tryst fer at vera lagt á politisku skipanina at taka forðingina av fyri sølu til SEV. Tað er tí eisini vert at umhugsa um loyvið heldur eigur at umfata sølutreytir til SEV fyri lágan prís (ella møguliga sølu í kapping), tá tørvur er á tí, og uttan skyldu hjá SEV at keypa. Hetta svarar til treytirnar fyri útboði, men við staðfesting av at nøgdin ið var í útboði var null.

Nú er Eysturlund nevnd her, tí tann verkætlanin hevur verið frammi, men tað kundi verið einhvør onnur verkætlan, talan var um – støðan hevði verið tann sama.

Elhandilsfeløg og brúkaravernd

Lagt verður upp til at elhandilsfeløg skulu kunna keypa el frá SEV og selja til sínar kundar, og at heilsøluprísurin verður søluprísurin hjá SEV frároknað umsitingarkostnaðin hjá SEV fyri hvønn kunda. Tvs. at um elhandilsfeløg ikki knýta elsøluna saman við antin sølu av vørum ella tænastum, so er rættiliga lítil vinningur at fáa. Tænastur kunnu t.d. vera:

- Stýring av elnýtsluni til hitapumpu, ventilatión og løðing av elbili móti gjaldi, so størri partur av elnýtsluni er, tá elprísurin er lágur
- Veiting av hita frá hitapumpu. Hetta er serliga upplagt, tí gomlu oljufeløgini hava keypt sær førleikar innan hitapumpur, og tey hava longu kundarnar. So við hesum kunnu tey varðveita kundarnar samtundis sum tey stuðla uppundir orkuskiftið. Trupulleikin er tó, at hetta kann skipast uppá ymiskar mátar, og at tað helst er neyðugt at skipa eina brúkaraverju fyri privatkundar.

Sølan kann skipast við:

- Funktiónsleasing, har hitapumpan er ogn hjá veitaranum, og tað áliggur veitaranum at gjalda fyri viðlíkahald. Um avtalan ikki verður endurnýggjað, so tekur veitarin hitapumpuna burtur frá matriklinum.
- Finansiella leasing, har hitapumpan verður ogn hjá kundanum eftir eitt ávíst avskrivingaráramál, og viðlíkahaldsavtala síðani kann gerast.
- Tinglýsing av hitaveitingaravtalu á matrikulin, so hitapumpan verður ogn hjá veitaranum, og avrokningin er bara fyri hitan og møguliga køling, um talan eru um vinnukunda við kølitørvi. Tinglýsingin ger m.a. at tað ber til at gera íløgu í jarðhitahol, sum ikki ber til at taka pant í, tí tað ikki kann takast burtur. Íløgan og avskrivingartíðin kann her vera nógv longri enn í hinum dømunum.

Ein tinglýsing av hitaveitingaravtalu svarar til at vera fjarhitakundi, og tað er vert at umhugsa, um kundaverja tí skal skipast uppá sama máta sum fjarhiti eftir at upprunaliga íløgan er avskrivað hjá veitaranum. Hetta er kanska serliga vert at umhugsa, um eitt felag bjóðar sær til at gera eina felags jarðhitaskipan í einum grannalagi. Ein slík felags jarðhitaskipan er ikki vanligur fjarhiti, men kann helst við fyrimuni leggjast undir fjarhita- (ella hitaveitingar-)reglunum, um binding til skipanina verður tinglýst á ognunum.

Fjarhiti - hitaveiting

Tað er gott, at lógargrundarlagið nú verður gjørt fyri fjarhita, og at tað stendur greitt í lógini, at kommunur kunnu luttaka í fjarhitavirksemi. Tað hevur manglað tí úrslitið

hevur verið ógjøgnumskygni í prísum/kostnaði og kanska serliga at fólk hava verið tvungnir kundar í eini skipan ið er dýrari enn tað, tey annars kundu fingið hitan fyri við egnari hitapumpu. Tað er ikki rímiligt.

Stóri munurin millum fjarhita og elveiting er, at hitaframleiðslan er nógv nærri kundanum, og at ikki øll hava ella kunnu fáa fjarhita. Hartil er fjarhiti í kapping við aðra tøkni, ið kann máa fíggjarliga grundarlagið undan fjarhita, tí íløgan er stór og arbeiðskrevjandi. Og tí eisini hevur umhvørvisárin, sum lógaruppskotið sigur skal takast við í metingini, um loyvi skal gevast til fjarhita.

Har er tó serliga ein stórur trupulleiki við uppskotinum sum er. Tað er at áseting-arnar ikki nóg greitt skilja millum fjarhitaframleiðsluverk og fjarhitanet og letur góðkenningar av báðum vera 20 ár. Tað kann vera skilagott at lata fjarhitaframleiðsluna vera 20 ár, men grundarlagið fyri hesum er ein meginregla um at

- Loyvistíðin skal samsvara við tekniska livitíð
- Og tí eisini avskrivingartíð upp á 20 ár.

Tvs. at umhvørvisliga afskrivingin, tá ymisk tøkni verður sett upp móti hvørjum øðrum, eisini verður 20 ár.

Um samsvar skal vera millum tekniska livitíð á fjarhitarørum og avskrivingar- og loyvistíð, so eigur hetta at vera omanfyri 50 ár. Fíggjarliga- og umhvørvisliga avskrivingin eigur eisini heldur at vera 50 ár enn 20 ár. Við at hava 20 ára loyvistíð avmarkast íløgurnar í nýggj fjarhitarør og tí eisini íbinding av nýggjum kundum til byrjanina av loyvistíðini, tí tað skapar óvissu, og tað ikki ber til at avskriva íløguna innan fyri restini av loyvistíðini. Tað hevði tí verið betri um fjarhitanetið IKKI hevði 20 ára loyvistíð men heldur var regulerað sum eitt natúrligt monopol sum vatnveiting ella elveiting. Hetta gevur serstakliga meining, tá tað eisini verður skotið upp, at har skal vera alment eftirlit við fjarhitafeløgum, so prísurin verður so lágur sum møguligt, samstundis sum neyðugar íløgur verða gjørdar.

Ein avskrivingartíð uppá 50 ár krevur sjálvsagt at langfreistaði og/ella avdráttarfrí lán, men júst ásetingin um at kommunur hava loyvi at vera partur av fjarhitavirksemi letur upp fyri at kommunur kunnu veðhalda fyri lánum, sjálvt tá tað ikki er kommunan men t.d. ein býlingur ið tekur seg saman um at gera felags hitaveiting.

Ein slík felags hitaveiting kann vera vanligur fjarhiti, men tað kann eisini vera t.d. eitt termonet – ein felags jarðhitaskipan, har hvørt hús hevur sína egnu jarðhitapumpu, og har tí ikki eru felags rakstrarkostnaður. Hetta kann vera bíligari enn fjarhiti og minkar um samlaðu íløguna til jarðhita. Samstundis ger ein slík skipan tað møguligt at gagnnýta avlopshita frá t.d. køli- og frystivirksemi. Sum víst á omanfyri, liggur tað væl fyri hjá elhandilsfeløgum stuðla uppundir og reka slíkar

skipanir. Tí eigur støða at takast til, um tað bara er gomul fjarhitatøkni ella eisini aðrar hitaveitingarskipanir ið skulu skipast undir broyttu elveitingarlógini.

Hitaveiting og býarskipan

Allir bygningar í Føroyum skulu leggjast um frá upphiting við olju komandi árini. Tvs. at øll húsarhald í landinum, umframt virki ið ikki longu hava lagt um, skulu taka støðu til, hvussu upphitingin skal vera framyvir. Samstundis er tað upplagt, at um ov nógv jarðhitahol verða gjørd í einum øki, so máar tað grundarlagið undan fjarhita har. Jarðhitaboringar krevja loyvi frá kommununi. Tí eigur tað at vera álagt kommununum skjótast gjørligt at gera eina hitaveitingarætlan ið vísir hvar tað sannlíkt kann gerast fjarhiti og so leggja ætlanir fyri hesum. Sum sagt kann felags jarðhitaskipan eisini vera partur av hesum.

Sum skilst verður hetta helst partur av aðraði lóg. Tað ger tað tó ikki minni átroðkandi, tí óvissa kann føra til at skeivar avgerðir vera tiknar.

Vilhjálmur Nielsen
Granskari
Danmarks Tekniske Universitet